Til Fiskivinnu- og Samferðslumálaráðið

Vørn hevur hesar viðmerkingar til uppskotið:

- Til § 1, nr. 1: Vørn metir, at ásetingin um at avmarka flytingar av døgum, so hesir bert kunnu fremjast millum fiskifør innan støddirnar fyri bólkarnar, kundi verið víðkað til eisini at krevja, at talan skal vera um før, ið royna við sama reiðskapi – hetta hevur staðið fyrr sum eitt atlit í viðmerkingunum til lógina (uppskotið frá 2019). Dømi hava verið um, at línudagar verða fluttir á fiskifør, ið royna við trolreiðskapi, so fiskiorkan økist munandi av flytingini. Hetta metir Vørn verða í stríð við endamálið við fiskidagaskipanini.
- Til § 1, nr. 2: Ásetingin nevnir kvotur, hóast ásetingin letist bert er vera galdandi fyri avhending av fiskidøgum. Vørn mælir til, at orðingin verður broytt, so at "60% av kvotuni" verður broytt til "60% av fiskidøgunum". Harafturat eigur "fiskaslagnum" at vera í fleirtal ella bæði í ein- og fleirtal, av tí at fiskidagar ofta fevna um fleiri fiskasløg – kanska kundi verið umhugsað at umorða ásetingina, so at talan er um 60% av serstaka fiskiloyvinum ella tílíkt.
- Til § 1, nr. 3: Her kann t.d. eisini vera talan um botnkvotu, tvs. fleiri fiskasløg. Her eigur orðingin at vera í fleirtal.

Vinarlig heilsan / Mvh / Best Regards / Bestu kveðjur

Hannus Petersen
Løgfrøðingur
Fiskiveiðieftirlitið
The Faroe Islands Fisheries Inspection
Yviri við Strond 3, Postboks 1238
Mobil: +298 291012
mailto:hannusp@vorn.fo